## Maður fekk skaða

Sunnunáttina var ein tyrla hjá íslendsku vaktar- og bjargingartænastuni eftir einum manni, sum hevði fingið skaða umborð á svartkjaftaskipinum "Guðmundi", sum er úr Vestmannaoyggjunum. Skipið var statt so langt úr landi, at tyrlan kundi ikki flúgva út eftir manninum, og tí mátti skipið venda og sigldi ímóti Íslandi. Tá tyrlan seinni tók mannin, var "Guðmundur" 200 fjórðingar suður úr Vestmannaoyggjunum, skrivar Morgunblaðið.

## Loðsar í verkfall

Tann 1. desember í fjør kom ein nýggj lóg um loðstænastuna í gildi í Danmark, men hóast samráðingar í næstan 10 mánaðir er eingin sáttmáli gjørdur millum tað almenna og loðsarnar, soleiðis sum lógin annars leggur upp til. Tað er felagið hjá loðsunum so misnøgt við, at tað hóttir við at lata sínar limir fara í verkfall tann 1. juni, er eingin sáttmáli til ta tíð. 135 loðsar eru í Danmark, og tað fær álvarssamar avleiðingar, fara teir í verkfall.

# til Fámjins



*Tað var ein heppin túrur, sum Jákup Jacobsen í Fámjin gjørdi við abbabørnunum í mølini hósdagin. Frá vinstru eru abbabørnini, Niels Jákup Mortensen, sum fann urið, Nancy Einarsson, Bogi Einarsson og Naina Mortensen*

# Ber væl til at reka av Norðpólinum til Fámjins



**Norðpólurin er livandi, so tað er als ikki ótrúligt, at nakað er rikið allan vegin av Norðpólinum til Føroya**

**REKI**
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er onki í vegin fyri at ein lutur rekur heilt av Norðpólinum til Føroyar, hóast tað er heilt fantastiskt.

Tað eru tveir vegir, sum eskjan við urinum kann hava rikið til Føroyar.

Hjálmar Hátún, havfrøðingur á Fiskirannsóknarstovuni sigur, at Norðpólurin og Pólisurin er í støðugari drift. Pólurin melur runt við klokkuni og tað verður ovurhonds nógvur ísur spýttur suður ígjøgnum Framsund ímillum Grønland og Svalbarð.

Sostatt er væl trúligt, at eskjan við urinum er rikin suður ígjøgnum Framsund í Eysturgrønlandsstreyminum. Nakað av honum fer út í Grønlandshav og Íslandshav og soleiðis kann eskjan verða rikin til Føroyar.

Men eskjan kann eisini verða farin við streymi og vindi heilt suður í Atlantshav, líka vestur til Ný Fundlands og so eysturyvir aftur til Føroyar.

- Havstreymarnir ganga soleiðis, at tað ber væl til, at eskjan kann verða rikin til Føroyar og tað er so nógvur røringur í Pólísinum, at tað kann eisini saktans lata seg gera upp á trý ár, sigur Hjálmar Hátún.

# Góðar vónir um at stabilisatorar á Smyrli virka á páskum

**Í løtuni er tað nógv, sum bendir á, at Smyril kann fara undir páskasiglingina við stabilisatorunum, ið virka sum teir skulu**

**SUÐUROYARSIGLING**
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin. fo*

Tað er nógv, sum talar fyri, at stabilisatorarnir á Smyrli fara at virka aftur fyri páskir.

Tað sigur Regin Vágadal, rakstrarleiðari á Strandferðsluni.

Hóskvøldið kom ein japanari til Føroyar at kanna brekið við stabilisatorunum á Smyrli, sum nú ikki hava virkað í tríggjar vikur.

Talan er um eitt umboð fyri virkið, sum hevur gjørt stabilisatorarnar og hann fór beinanvegin til verka umborð á Smyrli, tá ið hann kom.

Regin Vágadal, rakstrarleiðari á Strandferðsluni sigur, at tær fyrstu kanningarnar góvu vónir um, at brekið ikki er so álvarsligt og at tað ikki er neyðugt at fáa Smyril í dokk.

Men kanningar hesar næstu dagarnar stuðla uppundir, at brekið er ikki verri enn so, enn at tað ber til at umvæla tað ímeðan báturin liggur í sjónum.

Ber tað til at umvæla brekið sum Smyril liggur, verður tað kortini bara talan um eina fyribils loysn, tí so skal brekið takast í botn, tá ið hann annars skuldi í dokk í heyst.

- Enn ber ikki til at siga nakað endaligt, men tað sær avgjørt gott út, sigur rakstrarleiðarin.

Strandferðslan ætlar nú at avlýsa miðdgagstúrin í morgin og mikudagin so at arbeiðast kann upp á brekið bæði náttina og um dagin, fyri at fáa umvælingina so skjótt lidnað, sum gjørligt

### Tekur ein mánað

Vísir tað seg kortini, at Smyril skal í dokk, hava vit fingið fyribils játtilsi upp á at leiga estlendsku ferjuna, St. Ola frá 10 apríl til 15. mai. Tað tekur nakrar dagar at sigla til Føroyar og tað merkir, at Smyril kann takast úr sigling umleið hálvan apríl, ella beint aftaná.

St. Ola skal so úr aftur Føroyum umleið 10. mai.

Tað ber til at fáa Smyril í dokk í Belfast og at sigla hann til og úr Belfast tekur einar tveir dagar hvønn vegin.

Tað merkir, at Strandferðslan hevur einar 20 dagar at umvæla brekið í.

Men umboðsmaðurin hjá verksmiðjuni metir, at verður neyðugt at senda Smyril í dokk og at taka stabilisatorarnir úr at umvæla teir, kann arbeiðið væntast at taka 10 dagar.

Sostatt verður tað ikki fyrrenn um mánaðarskiftið apríl, mai, at vit fáa Smyril í sigling aftur, við stabilisatorunum.

# Átta vilja vera stjóri á Strandferðsluni

**Innlendismálaráðið hevur fingið átta umsóknir frá fólki, sum hava hug at standa á odda fyri Strandferðsluni, nú hon skal flytast til Suðuroyar**

**STJÓRASTARV**

Á miðdegi í dag var freistin úti at søkja starvið sum stjóri á Strandferðsluni.

Hilmar Høgenni í Innlendismálaráðnum sigur, at tey hava fingið átta umsóknir.

Innlendismálaráðið fer nú at gjøgnumganga umsóknirnar og síðani skulu umsøkjarar veljast burturúr at verða innkallaðir til setanarsamrøður.

Ætlanin er so at seta stjóran sum skjótast.

Hilmar Høgenni heldur, at tað eigur at bera til at seta starvið millum teir átta umsøkjararnar og tí metir hann ikki, at tað verður neyðugt at lýsa endurlýsa starvið. Men tað er so við tí fyrivarni, at hann hevur ikki gjøgnumgingið umsøkjararnar enn.

Ein hin fremsta uppgávan hjá nýggja stjóranum verður at leggja arbeiðið til rættis at flyta Strandferðsluna til Suðuroyar og frá 1. januar verður arbeiðspássið í Suðuroy